




*Røðin av skermum tekur seg væl út í Elding, men spurningurin er so, um tey verða liðug at seta alt upp til hósmorgunin?*



*Hósmorgunin verður hetta ljósa hornið café hjá Allan Hjaltalin, bakara*



*Forhøllin sædd úr evra*

meðan hann ikki sært stoltur vísir okkum runt í stásiliga umhvørvinum. Og vit bæði, myndamaðurin Jens Kristian, mugu viðganga, at her bæði lekkurt, stílfult og gjøgnumført.

250 fermetrar av koppastellum, pútum, køks- og gávulutum verða til keyps í deildini úr donsku handilsketuni Inspiratión, sum er eitt satt paradís fyri fólk við shopoholiskum eginleikum. Og klædnahandilin "Teir & Tara", sum vit kenna frá bygninginum hjá Elektron, verður granni hjá Inspiratión.




*Mads Andreas Winther framman fyri gávubúðuna Inspiratión*





## Søkt verður eftir einum fólki til Smyril Blue Water

SBW søkir eftir einum skrivstovufólki. Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

**Starvið fevnir um:**
Avgreiðslu av inngangandi farmi
Kundaavgreiðslu
Vanligt skrivstovuarbeiði
Trailarastýring
Estimering av útreiðslum

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst, at umsøkjarin hevur royndir innan skrivstovuarbeiði. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur skrivstovuútbúgving.

Neyðugt er, at viðkomandi er vanur at arbeiða við teldu.

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanaðarviðurskifti:**
Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært avtalu.

Umsóknir við møguligum prógvum skulu sendast til

Smyril Blue Water P/F
Att. Heðin Joensen
Postsmoga 3296
FO-110 Tórshavn
hedinj@sbwcargo.com

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. mars 2006

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heðin Joensen á tlf. 345962

*...Nordatlantens hurtigste fragtrute!*